## DAGSINS MEINING

# Sølan handan stongdar dyr

Samanleggingin av Fiskavirking og Fiskasøluna var, sum Heidi Petersen Løgtingskvinna so gott segði tað í kjaksending í SvF fyrrakvøldið, at líkna við eina sølu. At Framtaksgrunnurin legði Fiskasøluna og Fiskavirking saman, uttan at vita, um Fiskasølan var sølubar einsamøll er ein løgin avgerð, ikki minst fyri okkum skattgjaldarar, sum eiga ognirnar. Hetta tykist eisini verða rímiliga breið politisk semja um við onkrum markantum undantaki, sum man sá tað í SvF.

Fyri tveimum árum síðani vildi eingin hava Fiskasøluna, helst tí hon hevði vavt seg út í rækjuvinnuna og alivinnuna í stóran stíl undir fyrrverandi leiðslu og nevnd við tí úrsliti, at milliónaupphæddir hava verið í avskrivingum seinastu árini. Nú knappliga, tá Fiskasølan eftir øllum at døma aftur er vorðið eitt somikið áhugavert felag, at onkur hevur áhuga í felagnum, so byrjaðu søgur at ganga um eina samanlegging við Fiskavirking. Hetta fekk leiðslu og nevnd at lata eitt boð inn fyri Fiskasøluna. Hetta boð gjørdi eftir øllum at døma, at málið um samanlegging av Fiskavirking og Fiskasøluna fekk sovorðnan skund, at Fiskasølan mátti leggjast undir Fiskavirking á miðjari nátt, uttan nakran møguleika hjá nøkrum at geva eitt boð. Her eiga spurningar at svarast, tí fyri uttanfyristandandi sær hetta ikki út sum ein vinnuliga skilagóð avgerð.

Man kann halda, at tað er eitt sindur ivasamt, um ein søla kundi farið fram til leiðslu og nevnd í einum felag soleiðis uttan nakað, men boðið frá leiðslu og nevnd hevur í hvussu so er víst okkum skattgjaldarum, at Fiskasølan hevur eitt søluvirði uppá í leið 50 milliónir. Var boðið ov lágt, ongantíð betur fyri skattgjaldaran, tí so høvdu vit kunnað fingið uppaftur meir fyri Fiskasøluna, men hetta verða bert gitingar, tí Framtaksgrunnurin nýtti ikki hetta gylta høvið til at biðja um tilboð fyri Fiskasøluna til t.d. ársenda, so áhugaðir keyparar kundu nærlisið roknskapir o.s.fr. Hetta gjørdi Framtaksgrunnurin ikki, og tí stendur nevndin í grunninum eftir við forkláringstrupulleikanum, hvussu eitt felag, ið sambært formanninum í Framtaksgrunninum ikki hevur lív lagað, kann hava eitt søluvirði upp á tíggjutals milliónir.

Nú kom so eitt boð inn upp á Fiskavirking einsamalt upp á góðar hundrað milliónir. Hetta má verða stórsta ábendingin um at nevndin í Framtaksgrunninum hevur tikið eina skeiva avgerð. Boð fyri hálvtannaðhundrað milliónir liggja á borðinum fyri feløgini hjá Framtaksgrunninum, har nevndin í Framtaksgrunninum sigur, at onnur fyritøkan hevur ikki lív lagað, og hin er ikki sølubar, uttan eina fiskasølu. Tað er ikki so galið at fáa boðið hálvtannaðhundrað milliónir, um hetta veruliga er sum nevndin í Framtaksgrunninum sigur.

Fiskavirking kundi verið selt fyri nógvar pengar fyri tveimum árum, síðani, men har lá Framtaksgrunnurin sjóvarfallið av sær, og tíverri sær út til at tað sama kann endurtaka seg. Bert spell at man partlikviderar salgbaru Føroya Fiskasølu í prosessini.

Tvey reint føroysk boð vóru vrakaði í niðurgangstíðum. Einasti møguleiki hjá Framtaksgrunninum veruliga at fáa nógvan pening burturúr Fiskavirking og Fiskasøluni er, um onkur betalir dupultan prís fyri alt. Tað vildi bert hent, um onkur, t.d. íslendarar, strategiskt keypti seg inn í føroyska fiskivinnu. Er tað ein ynskilig støða, tá eingin føroyskur kappingarneyti av týdningi er til? Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Bøn í fimmaranum

# Frels okkum frá kvinnuligum prestum og fráskildum!

**Regin Eikhólm**



Vanliga verður sagt, at øll eru vit líka fyri Gudi, men hetta er ikki galdandi í øllum kirkjusóknunum. Tað finnast nevnliga nakrir kallkynsprestar í Føroyum, sum ikki góðtaka at kvinnur gerast prestar, og nokta at samstarva við tær. Ein teirra, Bergur D. Joensen, prestur við Vesturkirkjuna, gjørdi hetta greitt í fimmaranum í Útvarpi Føroya 24/11-04

Tað var tí vælgerandi at síggja lesarabrævið frá 22 ára gomlu Tórun Hansen, undir heitinum: "Nei, álvaratos Bergur" (Dimmalætting 25/11-04), sum eina reaktión upp á sama fimmara. Tórun átalar harðliga Berg D. Joensen, prest, fyri ein avoldaðan, dømandi og funda-mentalistiskan hugburð, vendir móti kvinnuligum prestum og fráskildum.

Inntil 1947 var í danska kongaríkinum bert loyvt monnum at blíva prestvígdir, men nýggja lógin frá 1947 sigur, "at *personer*, der har bestået teologisk embedseksamen, kan præsteviest".

**Jesus og kvinnurnar**
Frásagnir hjá teimum fýra evangelistunum, Matteus, Markus, Lukas og Johannes, siga okkum hvussu Jesus møtti kvinnunum. Harav framgongur, at Jesus sjálvur uttan himpr setti seg út yvir tabufongdu økini og avmarkingarnar annars hjá ísraelsku kvinnuni. Hann gjørdi ikki mun á kvinnu og manni, tey vóru fyri honum javnlíkar og fingu somu virðuligu viðferð, uttan mun til hvat ella hvørji tey vóru. Hetta var annars óhoyrt tá á døgum.

**Paulus og kvinnunar**
Paulus, sum av mongum verður brúktur til at blástempla "kvinnukúgan", var urkristindómsins størsti trúðboðari við mongum eginleikum. Hann var uppaldur í strangari fariseirskari lógarond og hevði eina rabbinara fortíð, har maðurin er skaptur í Guðs bílæti, meðan kvinnan bert hevur mansins endurskyn og ein undir-ordnaðan tænandi status. Hon kundi tí ikki gerast prestur. Hesa gomlu konstellatiónina millum mann og kvinnu heldur Paulus fast við, og hon endurspeglast í hansara analogi millum mann-kvinnu og kristus-kirkju. Ein gomul jøda hugmynd um Jahve og hansara brúður Ísrael.

Jesu javnlíkisfatan vann ikki frama hjá Paulusi. Helst hevur tað fallið Paulusi lættari at stýra kvinnunum eftir tí gamla kenda leistinum frá rabbinaratíðini og geva teimum munnkurv upp á.

**Opportunir kirkjufedrar**
Eins og Paulus so gloymdi mangur kirkjufaðir sera opportunt alt um Jesu javnlíkisfatan og gjørdi sær eftirfylgjandi dælt av hesum. Mystificerandi gnostiskar útleggingar vóru gjørdar um tað "djevilskt lokkandi og tølandi" kvinnuna, ið ein skuldi vara seg fyri. Summar enntá so vandamiklar, at tað í 1484 kom eitt pávabræv, ið staðfesti existensin av heksum, soleiðis at kirkjufedrarnir og umboð teirra - í Harrana navni - noyddust at brenna fleiri teirra á báli.

At kirkjunar umboð hava brúkt allar snildir fyri at halda kvinnuni niðri er ikki nakað nýtt. Vit síggja tað klárt hjá tí lærda Thomas Aquinas (1225-74), tá hann út frá Aristoteles (384-322 f. kr.) millum mangt annað kom til ta niðurstøðu, at kvinnan var ein miseydnaður maður, og kundi tí ikki gerast prestur. Hansara læruskipan, Thomisman, hevur verið normgevandi dogmatikkurin hjá katolicismuni, har kvinnan - ikki yvirraskandi - framhaldandi er "the underdog".

**Nútíðin**
Jesu fatan av kvinnu og manni sum javnlíkar var kontroversiel fyri hansara samtíð, men má sigast at hava verið guddómliga framsíggin og beinrakin, meðan 1950-ára gamla feminufoba paulusdoktrinin er stað- og tíðarbundið rabbinara arvagóðs, og als ikki í samsvar við Jesu javnlíkis fatan.

Í dag vita vit, at kvinnan er eitt heilskapt sjálvstøðugt individ á jøvnum føti við mannin, og tað eigur at vera ein sjálvfylgja, at kvinna og maður fáa somu virðiligu viðferð, sum Jesus longu gav teimum fyri 2000 árum síðani. Apartheid líknandi atferðin móti okkara kvinnuligu prestum og fráskildum er rædandi og alt annað enn tíðarhóskandi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.